# óð í fjósinum



*Tey vóru bæði í sínum tjóðarbúnum, brúðarparið í Kirkjubø* Mynd: Ole Wich

omaná var ein trifta av rabarbum, blandaðum við jarðberum og við súrróma afturvið.

Út móti morgni varð so boðin oksahalasúpan. Og brúðgómurin sjálvur heldur, at alt riggaði avbera væl.

- Tað tóktist, sum fólk vóru væl nøgd, bæði við borðhaldið, undirhaldið, dansin og við veitsluna sum heild, sigur Sigert Patursson.

Borðreitt var til smáar 300 gestir, og tað er á leið tað, ið rúmast inn í fjósið í Kirkjubø.

## Eingin brúðarferð – enn

Tá borðhaldið var at enda komið, bleiv umleið helvtin av borðunum beind burtur, og hin helvtin flutt út til síðurnar. Og var farið upp á gólv, sum vanligt er í brúdleypum, og brúðarvísan kvøðin.

- Slíkar gamlar traditiónir verða hildnar í Kirkjubø. Her verður vanliga føroyska brúðarvísan kvøðin, og soleiðis var eisini fríggjakvøldið. Eisini er vanligt, at skotið verður fyri brúðarpari í Kirkjubø, og tað varð tað eisini, tá vit blivu gift. Tó er tað soleiðis, at tað bert verður skotið, tá brúðarparið kemur úr kirkjuni, sigur Sigert Patursson.

Spælt varð undir við borðhaldið, og tá brúðarvísa og brúðarvalsur var farið aftur um bak, var vanligur dansur.

- Neyðugt var at dansa á betonggólvi, men tað gekk eisini, sigur Sigert Patursson.

Hann hitti grønlendsku konu sína í einum brúdleypi í Kirkjubø fyri hálvum øðrum ári síðani, og tí var tað ógvuliga passandi, at tey bæði eisini blivu gift har. Annars býr hann á Vatnaskørðum í Hoyvík og hevur fest Hoyvíksgarðin.

- Tað er ikki so lætt at loypa frá, tá ein situr við einum festi, so brúðarferð verður av ongum – í hvussu er ikki nú, sigur Sigert Patursson, sum saman við konuni, Aliku, fingu ein hugnaligan dag og eina góða veitslu í fjósinum í Kirkjubø.



*Alika Tornge Sinarujuk Qaavigaq Patursson er fulla navnið hjá brúðurini. Hon segði eisini nøkur orð undir borðhaldinum í fjósinum í Kirkjubø*

Mynd: Lars Mohr Nielsen



*Sjálvandi varð brúðarvísan kvøðin. Á myndini Bjørn Patursson, brúðarparið og Jóannes Dalsgaard, sum skipaði*

Mynd: Lars Mohr Nielsen